Hvidovre 08.10.2010



Hey tit í Lívdini.

Vit trý vilja takka tykkum hjartaliga fyri at tit minnast okkum í bønunum, fyri heilsanir á facebook, kort, tógv, bindibók☺ og tann stóra peningaligan stuðul. Tað var sera rørandi at lesa heilsaninar, sum vit fingu tá Elisabet kom at vitja okkum. Alt hetta hevur verið við til at gera dagligdagin lættari hesa tíðina.

Vit hava tað eftir umstøðunum gott, og gongur tað enn framá hjá Edvardi. Við verandi framgongd kann hugsast at vit sleppa heim um mánaðarskifti oktober november, men tað er sjálvandi óvist, tí vit vita ikki hvussu tað fer at ganga víðari.

Skaðin, sum Edvard fekk er álvarsligur, serliga skaðin í høvdið, sum var eitt skallabrot frá aftanfyri oyra og heilt fram undir næsabeinið, men brotið hevur ligið gott, so eingin skurviðgerð hevur verið neyðug, møguliga verður hoyrnin í høgra oyra niðursett av skaðanum, sum umfatar oyra innvendiga. Hini brotini eru afturgrógvin og slapp Edvard av við gipsið á arminum 5. okt.

Tað meira álvarsliga, er heilin, sum hevur fingið ein sera stóran stoyt. Har er eisini stór framgongd og minnist Edvard meira, samtíðis sum hann gerst meira vakin ella klárur. Eisini eru rørslurnar blivnar næstan heilt góðar. Tó er alt ikki komið uppá pláss enn.

Edvard hevur nógv góð fólk rundan um seg, sum venja hann bæði likamliga og sosialt – alt mátti venjast upp av nýggjum, sjálvt at eta, ganga, ja, øll tey grundleggjandi tingini.

Til stovugongd í dag varð lagt upp til at vit fara onkran longri túr í býðin við Edvard í vikuskiftinum.

Her á sjúkrahúsinum siga tey annars at framgongdin hjá Edvard hevur verið nógv betrið og skjótari enn væntað og eisini enn tað vanliga plagar at vera eftir slíkan skaða. Orsøkina til hetta trúgva vit eru allar tær bønir í eru bidnar fyri okkum og serliga Edvard.



Vinarlig heilsan Edvard, Dova og Einar Vang